VIÐMERKINGAR

Heiður og tøkk til teirra, ið stuðlaðu Fuglafjarðar Mentanarhúsi

Willy Jan Feilberg

Mong eru hugskotini, og nógv verður tosað, so ikki er altíð lætt at skilja ímillum dreymar og veruleika. Sum menniskju eru vit borðin í heimin, hvør við sínum førleika. Tað er sera ymiskt, hvat ískast vit vilja leggja eftir okkum til tað stutta lív, okkum er lutað her á jørð.

Í Fuglafirði bleiv nógv tosað um, at her hendi einki, tað var ólika fyrr, søgdu tey eldru, og tey ungu nýttu nógva tíð uppá at vísa sína ónøgd, bæði á ein og annan hátt. Tað var ikki einki, ið hendi, men ónøgdin fyllir ofta ov nógv í lívi okkara.

Hvat, ið er mest átrokandi í eini bygd, skal eg lata verða ósagt, men eitt lív uttan samanhald, tað er eitt fátækt lív. Hettar mátti vit fuglfirðingar eisini ásanna, at tað vóru heili fýra feløg stovnað við sama endamáli, áðrenn nakað spurdist burtur úr. Hesi somu fólk leitaðu saman um síðir, og stovnaðu eitt óheft felag ið fyribils fekk av tekniskum ávum navnið Fuglafjarðar Sjónleikarafelag, felagið skuldi hava einans eitt endamál, tað var at byggja eitt mentunarhús.

Nú tann altavgerandi treytin var uppfylgd, nevniliga at standa saman og lyfta í felag, nú bar til. Seinru helvt í áttati- og fyrst í nýtiárinum var sera nógv virksemi í felagnum, tá bleiv stoypiskeiðin tilevnað. Tað var avbera hugaligt at síggja og hoyra, hvussu áhugin og forvitnið vaks millum manna.

Eftir at hava fingið tað sera snotiliga grundøkið frá kommununi, bleiv Mentunarhúsið meistarliga reist og innilokað, fyrsta byggistig var nátt. Jú vit kunnu í Fuglafirði, men vit vuksu við uppgávunum og sóu skjótt, at her muga nógvar góðar kreftir finnast afturat okkum í bygdini, og her vóru vit sera heppin, smátt var við pengum, men vit møttu so stórari vælvild frá kønum monnum, at uttan teir, ja so hevði okkara verk ikki lukkast so væl.

Seinru helvt av nítiárinum kom stígur í. Fólk komu og fóru úr nevndini, og bert nøkur fá møttu til aðalfundir, ein sera stræv in tíð, nógvar vóru gitingarnar, men onki var so oyðandi sum tær spillandi tungurnar. Ein dagin eg var uttan fyri og arbeiddi kom ein maður og spurdi, hví vit skuldu gera hettar fanans hús. Tá fleyt yvir og eg hevði besta hugin at stinga í sekkin. Á veg til hús fór eg inn til eldri konu. Eftir at hava fingið góðan drekkamunn spyr hon, hvussu gekst við húsinum. Eg fortaldi sum var. Tá letur í henni, at ikki visti hon um nakran vegg, ið hevði syndað, rætt hevði hon og tær oyðandi tungurnar fakkaðust aftur, og mótið kvinkaði spakuliga uppeftir.

Eftir langan støðg við byggingini, byrjaði langt stræv ið nevndararbeiði at bera frukt, vit høvdu millum annað gingið hús úr húsi og biðið um stuðul. Hettar gav pengar og tá fólk stilltt igandi fóru á loftið og løgdu stórar seðlar á borið, men helst vildu vera ónevnd, og onnur bjóðaðu seg fram sum frivilliga arbeiðismegi, tá fingu vit megi av nýggjum, nú kom rættulig ferð á.

Tá bygningurin var komin væl ávegis uttan eitt oyra í skuld, við góðum stuðli frá sponsorum og vælvild frá kommununi, tá fyrst vildu bankarnir veita lán, men nú var trúgvin eisini so sterk millum fólkið, at ikki var pláss fyri øllum í nevndini, og hetta var at frøast um, at tað vit einaferð trúðu uppá og lyftu í felag, gekk upp í eina hægri eind.

Bonny M., Brandur Enni, Glyntan, Eivør Pállsdóttir o.s.f. spæla í Fuglafjarðar Mentunarhúsi, jú vit hoyrdu rætt. Nú er bert trupulleikin hjá okkum, hvat skula vit fara til, ein óhoyrd støða.

Sum limur í felagnum øll árini, vil eg hervið vísa á, at tit sum frivilliga á ein og hvønn hátt stuðlaðu, tit smurdu liðini, so vit saman við ómetaligum dugnaligum fólki fingu Mentunarhúsið til tað, tað er í dag. Nú stendur tað upp til ein og hvønn at fáa sum frægast burtur úr, tí skal tað verða mín vón, at vit møta fjølment til aðalfundir og á tann hátt stuðla um nevnd og Hús, við góðum konstruktivum hugskotum.

Panikkur ella taktikkur hjá Høgna og co.

Johan Dahl
Løgtigsmaður

Nú kom útmeldingin frá formannið tjóveldisfloksins um, at lógin um skrásett parlag skal roynast í tinginum.

Tað kann undrað mangan at hetta lógaruppskotið yvirhøvur kemur hartil og grundin er sera einføld - Høgni hevur ikki meiriluta við sær í samgonguni og veit, at um hann kemur í tingið við hesum uppskotið, so hava samgongulimir gjørt púra greitt - **AT SAMGONGAN ER FOKIN!!!!**

Men er orsøkin hjá Høgna kanska ikki ein heilt onnur????

Eitt figgjarlógaruppskot , ella rættari ein figgjarlógarkladda sum menn/kvinnur innan samgonguna eru sera ójøvn á málið um, hevur verið til fyrstu viðger og hendan viðgerð var alt annað enn positivt viðgjørd, hvørki frá samgongu ella andstøðu.

Sannleikin er nokk rættari tann, at tjóveldisflokkurin vil finna sær eitt rímingarhol burturúr landsins leiðslu ongantíð ov skjótt,- men tað er sera umráðandi fyri teir, at tað **ikki verður figgjarlógaruppskotið** og tann ótolmaða økingin í rakstarútreiðslunum seinastu árini og tær truplu tíðirnar við stórum sparingum ið liggja fyri framman, sum verða orsøkin til slitið.

Orsøkin til slitið skal verða málið um skrásett parlag - við orðum orðum - Tjóveldisflokkurin skal ikki verða syndarin, men Miðflokkurin og adoptivbarnið hjá fólkaflokkinum nevniliga Sjálvstýrisflokkurin og kanska ein partir av fólkaflokkinum við.

Tykist sum búmerki teirra - tjaldrið er rætt valt, - tá tað várar í Føroyum so kemur tjaldirð men tá tað ørtlar í veðrinum so sleppur tað sær burtur aftur.

Soleiðis er ivaleyst eisini við Tjóveldisflokkinum!!!

Livst so spyrst.

1. FLOKS BRÚKTIR BILAR

Landsins lagaligasta brúktbilafigging við 20% útgjald, og restina tosa vit um.

Bilfriðkan við Velbastaðvegin

Tlf 317300 - Fartelefonir 217300 & 211662 - 100 Tórshavn - WWW.bilfridkan.fo

Cafeteria-leder

Fra 1. januar 2008 er stillingen som cafeterialeder for cafeteriaet i Mjørkadal ledig.

Vi søger en med uddannelse som kok eller med lignende kvalifikationer. Du skal være i stand til at disponere indkøb, økonomi og stå for den daglige produktion. Du skal have erfaring fra en ledende stilling i et cafeteria eller lignende.

Vi tilbyder en fuldtidsstilling på 37 timer om ugen med løn efter indsats under overenskomst med Forsvarets Civil-Etat, NYLØNs-aftalen.

Skriftlig ansøgning sendes til Færøernes Kommando senest 15. nov. 2002. Spørgsmål kan rettes til Peter Gram, tlf 341410 eller Preben Funch, tlf 341440.

Cafeteriaet i Mjørkadal sælger morgenmad og varm/kold frokost til ansatte på Færøernes Kommando og besøgende. Omsætningen er på knap ½ mio. kr. Udover cafeterialeder er der en fuldtidsansat køkken med hjælper.

Færøernes Kommando
Mjørkadalur
Postboks 3195
110 Tórshavn
Tlf. 311420

Sosialurin -tað loysir seg

FAROE LAW

Bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við Eyðfinn Jacobsen, advokat ella Kára á Rógvi, adv. fulltrúa um tygara tørv

Tinghúsvegur 14,4
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 · fax 359901
mob 219902
faroe-law@faroe-law.fo
www.faroe-law.fo

Taljur
Stroppar
Trýst-slangur
Spuil-slangur
Slangu-vognar

Tórshavnar Maskinhandil
v/ Tummas Andreasen
Varðaveg 29 - 30
100 Tórshavn - Tlf. 313442

SKIPASMIÐJAN

ABS Kavpumpur
-lágan rekstrarkostnað
-stórt úrval

P/F Tórshavnar Skipasmiðja
Tlf: 31 11 39 - Fax: 31 11 39

P/F Skipasmiðjan í Klaksvík
Tlf: 44 11 66 - Fax: 44 11 66

34 Klaus Veld
tlf. 21 11 65

www.faroeyard.fo - E-mail: sales@faroeyard.fo